## Torbjørn spyr um mark

Herfyri segði Jóannes Eidesgaard, løgmaður, at samgongan hevur gjørt av, at í seinasta árinum í valskeiðinum kunnu landsstýrismenninir einsæris leggja fram eitt ella tvey uppskot, sum skulu tryggja borgarunum betri tænastur. Tá Løgtingið kemur saman í morgin, fer tingmaðurin Torbjørn Jacobsen at spyrja Bárð Nielsen, landsstýrismann í fíggjarmálum, um samgongan hevur ásett nakað mark fyri, hvat hesi uppskot kunnu kosta.

## Privat fígging skilagóð

Landsbankastjórin, Sigurð Poulsen, heldur, at tað kann vera skilagott at lata privat partafeløg fíggja stórar verkætlanir, tí á tann hátt kunnu bæði góðar og bíligar loysnir fremjast í verki. Hann heldur eisini, at er ein verkætlan nóg stór, kann tað hugsast, at altjóða fyritøkur hava áhuga í at vera uppií. Tað kann elva til kapping um uppgávurnar, og tílík kapping fer at trýsta prísin niður. So privat fígging verður kanska meiri vanlig í framtíðini.

# óða heilsu og ert djarvur



*– Um eg fari avstað aftur eftir hendan túrin, dugi eg ikki at siga, men tað vil eg ikki útiloka. Hetta veldst eisini um, hvussu heilsan verður, tí sjólívið krevur góða heilsu, sigur Høgni Debes Joensen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Konan, Randi Mohr:

## Vit skriva long brøv...

**– Eg haldi, at tað er deiligt hjá Høgna at sleppa til skips, og eg havi einki ímóti at vera einsamøll, meðan hann er burtur. Men tað er deiligt at fáa mannin aftur, sigur kona landslæknan, Randi Mohr**

AT SITA HEIMA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.*

– Vit hava so nógvar sjómanskonur í Føroyum, og eg havi einki ímóti at teljast millum hesar, nú maðurin aftur hevur hug at royna sjólívið. Tíðin gongur so skjótt, og eg havi einki ímóti at vera einsamøll, meðan maðurin er burtur. Men tað verður deiligt at fáa hann heimaftur, tá ið túrur er lokin.

Tað sigur Randi Mohr, kona landslæknan, Høgna Debes Joensen, sum mynstraði umborð á Skálabergi mánakvøldið.

– Vit tosa saman av og á, men vit samskifta við teldupostí hvønn dag.

Randi dylur ikki, at hon og Høgni skriva langar meylar hvønn dag, hann er burtur – og hon er heima.

– Hetta er ein øðrvísi samskiftisháttur millum okkum bæði, og hetta hevur eisini sína ”sjarmu”, um vit so kunnu siga. Høgni fortelir mær, hvat hendir umborð - og eg fortelji honum, hvat hendir her heima.

Hon vísir á, at við slíkum samskifti verður kanska okkurt skrivað, sum tú ikki sigur í tí dagliga, og tí er hetta ein øðrvísi – men eisini áhugaverdur – samskiftisháttur, meðan maðurin er burtur.

– Tá ið Høgni er komin aftur hinar báðar túrarnar, hevur hann verið rættiliga ”uppfrískaður”, sum Randi Mohr tekur til.

Hon ivast onga løtu í, at hesin túrurin eisini verður gevandi hjá manninum, Høgna Debes Joensen.

– Eg haldi, at tað er gott fyri okkum menniskju at royna okkurt nýtt – og fara burtur úr tí, vit gera dag um dag og ár um ár, sigur Randi Mohr.



*Kømrini umborð á Skálabergi eru hugnalig. Konan, Randi Mohr, hevur fylgt manninum umborð, og um nakrar tímar ber leiðin hjá landslæknanum upp í Barentshavið*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

fái høvi at royna meg við Skálabergi, fari eg sjálvsagt at samanbera skipini og lívið, sum er umborð. Á túrunum havi eg eisini tikið myndir, bæði deyðar og livandi.

### Kanska ein bók

Høgni vísir á, at hóast Sundaberg er eitt eldri skip enn Skálaberg, er Sundaberg kortini eitt gott og deiligt skip at vera umborð.

– Tá Skálaberg kom, hoyrdu vit nógv um allar teir møguleikar, sum manningin hevur umborð, og haraftrat er Skálaberg bygdur til at gera meira burtur úr tí tilfeingi, sum annars hevði farið í havið aftur. Hetta er eisini nakað, sum eg fari at hefta meg við, nú eg ætli mær at halda fram at skriva dagbók á frívaktunum.

Enn hevur landslæknin ikki havt stundir til at gera nakað meira við eina møguliga bók um túrarnar í Barentshavinum – og tað ger minni, tí nú fær hann so eisini høvið at skriva dagbók á hesum túrinum.

– Eg havi hugsað um eitt bókaheiti sum ”Við Sundabergi í Barensthavinum”, men nú verður tað helst ”Bjørgini í Barentshavinum”, altso bæði Sundaberg og Skálaberg, sigur hann.

Umborð á Sundabergi hevur Høgni Debes Joensen verið partur av manningini á verksmiðjuni.

– Her er nógv at takast við, tá fiskiskapurin er góður. Vit standa við pavnar og maskinur, vit pakka og arbeiða á frystarínum, sigur landslæknin, sum nú á triðja sinni er á veg upp í Barentshavið, hesaferð við Skálabergi.